Eysturlon er eitt byggivirki við 40 ára royndum innan nýbygging og umvæling. Vit byggja og umvæla bæði størri og smærri bygningar. Vit leggja æru í at gera eitt væl úr hondum greitt arbeiði, og á heimasíðu okkara ber til at síggja nøkur av avrikum okkara.

# Eysturlon søkir lærlingar innan húsasmíð

## Umsóknarfreist er 16. mai kl. 12.00

**Krøv og væntanir til tín, sum søkir:** Týdningarmikið er, at tú ert nærlagdur og hevur áhuga í at læra eitt væl úr hondum greitt handverk. Eisini er neyðugt, at tú ert hugagóður, virkin, jaligur og vísir góð evnir at samstarva.

**Vit bjóða spennandi uppgávur** og hava eina lærlingaskipan, sum er gjørd fyri at tryggja, at lærlingar okkara fáa eina góða, trygga og læruríka lærlingatíð. Vit leggja somuleiðis stóran dent á at hava trygd og trivna á arbeiðsplássum okkara.

**Eysturlon er ein byggifyritøka** við 40 ára royndum. Vit eru um 30 starvsfólk og hava ymiskar verkætlanir koyrandi samstundis. Hjá okkum er høvi at royna nógv ymiskt handverk, og vit ganga uppí, at lærlingar okkara koma væl runt at royna og læra ymiskt innan húsasmíð yrki.

**Ert tú áhuga/áhugaður at koma í læru hjá okkum, ella ynskir tú at hoyra nærri,** ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum við at ringja ella sms'a á tlf. 284256 Jógvan Hans ella tlf. 283577 Anna Maria.

**Umsókn** við avriti av prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) skal sendast til eysturlon@eysturlon.fo ella á postadressu:

***Eysturlon***
***Smyrilsvegur 3***
***100 Tórshavn***

Umsóknin skal vera okkum í hendi seinasta lagi mánadagin 16. mai kl. 12.00

**Vit gleða okkum at hoyra frá tær**




eysturlon

Smyrilsvegur 3
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 28 42 56
eysturlon@eysturlon.fo
www.eysturlon.fo